

## Nógv deyð av meningitis

Næstan 2.000 fólk eru deyð av meningitis í fleiri londum í Vesturafrika, og í amerikanska statinum Florida hevur sjúkan kravt fýra mannalív. Hóast amerikanski læknin Amanda Cohn herfyri umrøddi meningitis-tilburðirnar í USA sum óvanliga nógvar, hava fjølmiðlarnir gjørt lítið burtur úr sjúkuni. Felagsskapurin Læknar Uttan Landamark er farin undir eitt stórt átak í fleiri londum í Vesturafrika, og málið er aqt vaksinera átta milliónir fólk í Niger, Tjad og Nigeria. Felagsskapurin sigur, at hansara læpknar hava viðgjørt 56.000 sjúklingar, og at roynt verður at forða fyri, at smittan skal breiða seg.

# Íslendingar hava viljan



**Á fundinum, sum Eysturoyar Vinnulívsfelag skipaði fyri seinasta mikukvøld, var føroyska sendikvinnan í Íslandi, Gunvør Balle, eisini boðin við fyri at halda ein fyrilestur um støðuna í Íslandi**

FYRILESTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Føroyska sendikvinnan í Íslandi legði fyri við at greiða eitt sindur frá búskaparligu gongdini í Íslandi síðani kríggið og hvussu landið hevði upplivað sveiggj í búskapinum heilt fram til 1991, tá stór broyting kom í.

- Tað var eisini tá, at bankarnir vórðu privatiseraðir og búskaparvøksturin tók rættiligan dyk á seg, segði Gunvør Balle.

Fíggjargeirin var mest vaksandi branchan í Íslandi, og fram til skrædlið í fjør vóru bankarnir vaksnir til 11 ferðir BTÚ. Eisini greiddi føroyska sendikvinnan frá hvat hendi mánaðirnar eftir skrædlið og fram til dagin í dag.

- Hesar mánaðirnar hevur tað verið ráðaloysi og nærmast kaos, sum hevur merkt Ísland síðani alt skrædnaði og landið mátti taka um endan, segði Gunvør Balle.

1991 er ein varði í íslendskum politikki. Tað var tá at stjórnin hjá David Oddson tók við og fór undir eina miðvísa liberalisering við privatisering av bankum og almennum stovnum. Ognarskatturin varð avtikin og inntøkuskatturin settur niður. Kvotaskipanin var sett í verk og í heila tikið vórðu ein rúgva av pengum leysgivnir, sum áður høvdu verið bundnir. Grunnar vóru á tremur av pengum og lóggivið var, so hesir grunnar kundu fara út at gera íløgur. So har vórðu pengar frá privatiseringum, frá kvotaskipanini og frá grunnum, sum knappliga blivu leysgivnir, greiddi Gunvør Balle frá.

Henda leysgeving førdi við sær, at tað í stóran mun varð farið út um landoddarnar at gera íløgur við ógvuliga stórum váða, har tað framman undan so at siga bert vórðu gjørdar íløgur innanlands.

Ótálmaði vøksturin hjá bankunum hevur uttan iva verið orsøkin til, at skrædlið gjørdist so ógvusligt og stórt, tá tað kom.

### Megnaði ikki trýstið

Og júst hetta er nakað, íslendingar spyrja seg sjálvar í dag. Hvussu ber tað til, at fíggjareftirlitið ikki hevur havt betri eftirlit við bankunum. Hetta er kortini ikki ein serligur trupulleiki hjá Íslandi, men er nakað, ið kenst aftur í fleiri londum.

- Bankar í flest øllum londum hava ført eina ógvuliga ekspansiva strategi, tó at tað í Íslandi hevur verið serliga grelt, tí bankarnir hava kunna vaksið seg til 11 ferðir eina landsframleiðslu, segði Gunvør Balle.

Tað hevur verið ein trúgv upp á styrkina í fíggjarsektorinum. Íslendingar hava verið sannførdir um, at fíggjargeirin var vorðin størsta vinnan og fiskivinnan kom í aðru røð. Men tað vísti seg, at ein so lítil og opin búskapur við einari so veikari íslendskari krónu, sum ikki var tengd at nøkrum øðrum sterkari gjaldoyra, kláraði ikki at standa ímóti trýstinum, tá børsirnir byrjaðu at krakka, fyrst í USA við subprime-kreppuni.

Hetta er tað, sum Ísland hevur merkt serliga meint, og ein so lítil og opin búskapur megnaði ikki trýstið, og tí er størsta kjakevni í Íslandi í dag, um teir skulu fara upp í ES, fyri á tann hátt at fáa fatur á evruni sum gjaldoyra.

- Íslendska krónan hevur ført tey í so stórar trupulleikar og fer framvegis at halda tey í hafti, so fleiri flokkar síggja evruna sum einastu loysnina, segði Gunvør Balle.

### Positivan hugburð

Tað er sjálvandi nógv hent hesar mánaðirnar síðani skrædlið í oktober. Partvís hevur Ísland fingið nýggja stjórn frá at hava havt eina borgarliga samgongu til nú eina vinstrasamgongu, og tey hava eyðvitað nakrar raðfestingar og venda liberaliseringspolitikkinum bakið. Sjálfstæðisflokkurin hevur sitið við valdinum í Íslandi í 18 ár, og talan er ógvuliga nógv um eina uppgerð við tann politikkin.

Man vil nú sleppa av við slíkt, sum er ógvuliga inngrógvið í íslendskan polit-



*Fundurin varð hildin í nýggja mentanarhúsinum í Runavík*